# Kunngerðablaðið A

2009 Hefti 16

ISSN 0907-905X


Nr. 85 9. juni 2009

**Kunngerð**
**um**
**skiftisreglur fyri lesandi á Fróðskaparsetri Føroya, sum byrjað hava lesturin áðrenn 1. august 2008 og reglur um alment próvskeið í føroyskum**

Við heimild í § 3, stk. 1 og § 21, stk. 1 í løgtingslóg nr. 58 frá 9. juni 2008 um Fróðskaparsetur Føroya verður ásett:

## Kapittul 1
## Stevnumið og bygnaður

**§ 1**. Útbúgvingarnar á Fróðskaparsetri Føroya eru akademiskar útbúgvingar, sum geva studentinum ástøðiligar og verkligar førleikar og kunnleikar í vísindaligum háttaløgum og evnum.
*Stk. 2.* Útbúgvingarnar eru:
1) Bachelorútbúgvingar, sum eru 3 ársverk.
2) Masterútbúgvingar, sum eru 2 ársverk í framhaldi av bachelorútbúgving.
3) Granskaraútbúgvingar, sum verða skipaðar sambært serstakari kunngerð um Ph.D.- lestur.

**§ 2.** Eitt ársverk svarar til 60 námsstig, sum er fulltíðarlestur í eitt lestrarár. 1 námsstig svarar til 1 European Credit Transfer System (ECTS).

**§ 3**. Fróðskaparsetrið leggur bachelor- og masterútbúgvingarnar til rættis við skeiðum og valmøguleikum í námsskipan fyri hvørja útbúgving sær.

## Kapittul 2
## Útbúgvingarsløg og skipan av útbúgvingum

*Bachelorútbúgving*

**§ 4**. Bachelorútbúgvingin skal geva studentinum innlit í fakøki og kunnleika til vísindalig ástøði og háttaløg. Hon skal menna førleikan til at orða og skilmarka faklig greiðsluevni, til at lýsa, greina og tulka tey og soleiðis geva førleika til sjálvstøðugt arbeiði. Harumframt er bachelorútbúgving støði undir akademiska framhaldsútbúgving.
*Stk. 2.* Bachelorútbúgving gevur rætt til hesi heiti:
1) Bachelorútbúgving í hugvísindum gevur rætt til heitið baccalaureus artium, stytt B.A.,
2) Bachelorútbúgving í samfelagsfrøði gevur rætt til heitið baccalaureus socialis scientiarum, stytt B.S.Sc.
3) Bachelorútbúgving í náttúruvísindum gevur rætt til heitið baccalaureus scientiarum, stytt B.Sc.
4) Bachelorútbúgving í verkfrøði og tøknifrøði gevur rætt til heitið baccalaureus scientiarum, stytt B.Sc.

**§ 5.** Bachelorútbúgving er í minsta lagi 180 námsstig.
*Stk. 2.* Sambært námsskipan eru fyrstu 1 til 2 ársverkini í bachelorútbúgving støðisnám. Lokið støðisnám er treyt fyri at halda fram við bachelorútbúgving.
*Stk. 3.* Námsskipanin ásetur, hvørji støðisnám geva upptøku á hvørjari bachelorútbúgving.
*Stk. 4.* Námsskipanin fyri bachelorútbúgvingar kann í serligum føri tilskila, at aðrar útbúgvingar, møguliga við neyvari ásettum ískoytum, kunnu koma í staðin fyri støðisnám og geva upptøku á bachelorútbúgving.
*Stk. 5.* Bachelorútbúgving er annaðhvørt í einum fakøki ella samansett, har í minsta lagi 30 og í mesta lagi 60 námsstig eru í øðrum faki.

**§ 6.** Bachelorútbúgving endar við bachelorritgerð.
*Stk. 2.* Ritgerðin skal prógva evnini hjá studentinum at nýta vísindaligt ástøði og háttalag í arbeiðinum við einum avmarkaðum evni.
*Stk. 3.* Ritgerðarevnið skal vera avmarkað soleiðis, at arbeiðið við tí í minsta lagi svarar til 15 námsstig.
*Stk. 4.* Studenturin velur evnið í samráð við vísindastarvsfólk. Dekanurin staðfestir ritgerðarevnið.

*Masterútbúgving*

**§ 7.** Masterútbúgvingin skal menna fakligu vitanina, økja ástøðiliga og háttalagsliga førleikan, sum studenturin hevur ognað sær í bachelorútbúgvingini. Hon skal harumframt styrkja sjálvstøðugt arbeiðslag.

*Stk. 2.* Masterútbúgving gevur rætt til hesi heiti;

1) Masterútbúgving í hugvísindum gevur rætt til heitið magister artium, stytt M.A.
2) Masterútbúgving í samfelagsfrøði gevur rætt til heitið magister socialis scientiarum, stytt M.S.Sc.
3) Masterútbúgving í náttúruvísindum gevur rætt til heitið magister scientiarum, stytt M.Sc.
4) Masterútbúgving í verkfrøði og tøknifrøði gevur rætt til heitið magister scientiarum, stytt M.Sc.

**§ 8**. Masterútbúgving er 11/2-2 ársverk aftur at loknari bachelorútbúgving. Masterútbúgving kann vera sett saman av høvuðsgrein og hjánámi sambært § 10.

*Stk. 2.* Námsskipanin ásetur, hvørjar bachelorútbúgvingar geva upptøku á hvørjari masterútbúgving.

*Stk. 3.* Fróðskaparsetrið kann í serligum førum góðkenna, at aðrar útbúgvingar, møguliga við neyvari ásettum ískoytum, geva upptøku á masterútbúgving.

**§ 9.** Masterútbúgving endar við sjálvstøðugari ritgerð, masterritgerð.

*Stk. 2.* Ritgerðin skal prógva evnini hjá studentinum at nýta vísindaligt ástøði og háttalag í arbeiðinum við einum avmarkaðum evni.

*Stk. 3.* Ritgerðararbeiðið svarar til í minsta lagi 30 og í mesta lagi 60 námsstig.

*Stk. 4.* Studenturin velur ritgerðarevnið í samráð við vísindastarvsfólk. Dekanurin staðfestir evnið.

*Hjánám*

**§ 10.** Hjánám er 11/2-2 ársverk í øðrum faki enn bachelorútbúgvingin. Bachelorútbúgvingin verður tá høvuðsgrein í masterútbúgving.

*Stk. 2.* Tá masterútbúgving er sett saman av høvuðsgrein og hjánámi, verður masterritgerð skrivað í høvuðsgreinini.

*Stk. 3.* Hjánám, ætlað til at avriksflyta til lestur á lærdum háskúla uttanlands, kann vera sett saman av fakum og próvtøkum á ávikavist bachelorstigi og masterstigi. Nágreiniligari ásetingar verða tilskilaðar í viðkomandi námsskipanum.

## Kapittul 3
## Alment próvskeið í føroyskum

**§ 11**. Skipað verður fyri almennum próvskeiði í føroyskum.

**§ 12.** Endamálið er at menna førleikan at nýta málið sum amboð á ein góðan og fjøltáttaðan hátt og at økja fatanina av føroyskum máli og nýta tað í arbeiði, gerandislívi og til hægri lestur. Skeiðið skal økja um innlitið í føroyskt mál og menna tilvitið um mál og málnýtslu bæði í talu og skrift.

**§ 13.** Skeiðið fevnir um:

1) mállæru og venjingar í rættskriving,
2) upplestur og orðaskifti,
3) viðgerð av fjølbroyttum tekstum og
4) málburð og ymisk stílløg.

**§ 14.** Skeiðið byggir á ávísan forkunnleika, svarandi til føroyskt á miðnámsskúlastigi ella samsvarandi.

**§ 15.** Skeiðið endar við próvtøku.

**§ 16.** Til tess at standa krevst í minsta lagi 6 í miðal, tó skal einki einstakt próvtal vera lægri enn 5.

**§ 17.** Sami próvdómari er til allar stakroyndir í próvtøkuni. Hann verður tilnevndur av rektaranum.

## Kapittul 4
## Námskipan

**§ 18.** Fróðskaparsetrið ásetur nærri reglur um útbúgvingarnar í námsskipanum.

*Stk. 2.* Í námsskipanini verður ásett:

1) endamál, innihald, stødd og próvdøming, tilskilað í skeiðslýsing fyri hvørt fakið sær,
2) upptøkukrøv,
3) reglur um fakligar samansetingar og valmøguleikar,
4) undirvísingarhættir, lýstir sum floksundirvísing, fyrilestrar, skeið, venjingar, bólkaarbeiði, verkætlanir o.a.,
5) raðfylgjan av fakum, skeiðum, venjingum v.m. og møguligar treytir í lestrargongdini,
6) hvørjar próvtøkurnar eru og raðfylgja teirra í lestrargongdini,
7) próvtøkuslag ella próvtøkusløg, um studenturin kann velja millum fleiri sløg,
8) nær 13-stigin ella Staðið ella Ikki staðið verður nýtt,
9) nær próvdømingin er innanseturs ella uttanseturs,
10) reglur um bachelor- og masterritgerð.

*Stk. 3.* Tá ið ein námsskipan verður samtykt, og tá størri broytingar verða gjørdar, eigur Fróðskaparsetrið at kunna um tær.

*Stk. 4.* Námsskipanir og størri broytingar í námsskipanum koma í gildi við lestrarársbyrjan.

*Stk. 5.* Broytingar í upptøkukrøvunum, sum avmarka upptøkumøguleikarnar til masterútbúgving, kunnu bara gerast við 3 ára fráboðan.

**§ 19.** Fróðskaparsetrið ger og dagførir lestrarvegleiðing um útbúgvingarnar, har útbúgvingarnar verða lýstar nærri við dømum um valmøguleikar og samanseting av fakum.

*Avriksflutningur*

**§ 20**. Fróðskaparsetrið kann eftir umsókn góðkenna, at stakar próvtøkur og útbúgvingartættir, sum studenturin hevur staðið við annan lærustovn, verða flutt fyri javnmett avrik á Fróðskaparsetrinum.
Stk. 2. Avriksflutt próvtøka verður skrásett sum Staðin.

**Kapittul 5**
**Próvdøming**

**§ 21**. Endamálið við próvtøkum er at meta, um og í hvønn mun førleikarnir hjá studentinum eru í samsvari við tey mál og krøv, sum eru ásett fyri útbúgvingina í kunngerðini, námsskipanum o.ø. Staðin próvtøka er treyt fyri at skrivað verður út prógv.

**§ 22**. Teir førleikar, sum studenturin hevur ognað sær í útbúgvingini, verða prógvaðir við próvtøkum, íroknað próvdøming av bachelorritgerð og masterritgerð.
*Stk. 2.* Útbúgvingartættir, sum innihaldsliga ella arbeiðsliga loyva tað, kunnu heilt ella lutvíst prógvast við luttøku í undirvísing. Ábyrgdarlærarin ella lærararnir á hvørjum skeiði sær próvdøma undirvísingarluttøkuna hjá studentinum sambært hesum stykki.
*Stk. 3.* Próvtøkuhættirnir skulu hóska til endamálið við útbúgvingini og skulu tryggja, at hvør studentur verður mettur sjálvstøðugt.
*Stk. 4.* Próvdøming verður grundað á:
1) munnligar ella skrivligar próvtøkur,
2) skrivligar uppgávur, ið eru kravdar í undirvísingini,
3) luttøku á skeiðum, próvtøkum ella tílíkum, og
4) eina samanseting av nr. 1-3.

**§ 23**. Próvtøkumálið er føroyskt. Við próvtøkur, sum ikki hava til endamáls at prógva kunnleika um føroyskt mál, kann verða vikið frá hesi áseting.

**§ 24**. Próvtøkurnar eru annaðhvørt uttansetururs ella innansetururs.
*Stk. 2.* Uttansetursprófvtøkur verða dømdar av læraranum ella lærarunum og einum ella fleiri próvdómarum úr próvdómaraliðnum, sum er góðkent av Mentamálaráðnum.
*Stk. 3.* Innansetursprófvtøkur verða dømdar av læraranum ella lærarunum og einum ella fleiri próvdómarum úr vísindastarvsliðnum á Fróðskaparsetrinum.

**§ 25.** Próvdómarar eru annaðhvørt uttansetururs- ella innansetursprófvdómarar.
*Stk. 2.* Uttansetursprófvdómari er vísindafólk frá øðrum hægri læru- ella granskingarstovni ella fólk uttan fyri Fróðskaparsetrið við sama fakliga førleika.
*Stk. 3.* Vísindafólk, ið hevur undirvíst á Fróðskaparsetrinum, kann ikki vera uttansetursprófvdómari hjá studentum, sum hann ella hon hevur undirvíst á setrinum.
*Stk. 4.* Við uttansetursprófvdøming kunnu lærari og próvdómari ikki vera frá sama stovni ella, tá talan er um útlendskan stovn, frá sama institutti.
*Stk. 5.* Innansetursprófvdómari er vísindafólk ella styrkhavi á Fróðskaparsetrinum ella leysalærari, ið hevur undirvíst á Fróðskaparsetrinum seinasta árið.
*Stk. 6.* Mentamálaráðið góðkennir uttansetursprófvdómaraliðið fyri 5 ár í senn eftir nærri reglum, ið landsstýrismaðurin ásetur.

**§ 26**. Lærari og próvdómari skulu í felag tryggja:
1) at krøvini til eina próvtøku, munnliga ella skrivliga, eru í samsvari við endamálið í kunngerðum, námsskipanum og skeiðslýsingum,
2) at próvtøkan fer fram sambært galdandi reglum,
3) at studentarnir fáa einsháttaða og rættvísa viðferð, og
4) at avrikini hjá studentunum fáa álítandi próvdøming, ið eru í samsvari við reglur um próvtalagávu og aðrar reglur.
*Stk. 2.* Próvdómarin skal undir próvdømingini gera skrivligar viðmerkingar um avrikið og próvtalið. Viðmerkingarnar skulu brúkast sum grundarlag undir próvdómarans meting í møguligari kæru. Viðmerkingarnar skulu goymast í 1 ár.

**§ 27**. Í minsta lagi 2/3 av próvtøkunum í ávikavist bachelor- og masterútbúgvingini skulu prógvast við uttansetursprófvdøming. Hetta skal fevna um týdningarmestu partarnar av útbúgvingini, herímillum bachelor- og masterritgerð, sbr. §§ 6, 9 og 10.

**§ 28**. Próvtal verða givin eftir 13-stiganum ella dømingini Staðið ella Ikki staðið.
*Stk. 2.* Bachelor- og masterritgerðin verða próvdømdar eftir 13-stiganum.
*Stk. 3.* Fyri undirvísingarluttøku sambært § 22, stk. 2 verður dømingin Staðið ella Ikki staðið nýtt.
*Stk. 4.* Dømingin Staðið ella Ikki staðið kann í mesta lagi verða nýtt til próvtøkur, sum svara til 1/3 av útbúgvingini.

**§ 29**. Próvtøkurnar skulu verða lagdar til rættis sum einstaklingsprófvtøkur. Í námsskipanini kann tó vera ásett, at ávísar próvtøkur verða lagdar til rættis sum bólkaprófvtøkur, har fleiri studentar verða próvdømdir fyri felags avrik. Avrikini hjá studentunum skulu próvdømast hvørt sær.
*Stk. 2.* Bachelorritgerð og masterritgerð eru vanliga einstaklingsavrik, men kunnu eftir nærri reglum avrikast av fleiri studentum í felag. Avrikini hjá studentunum skulu próvdømast hvørt sær.
*Stk. 3.* Í eini skrivligari bólkaprófvtøku skal bera til at eyðmerkja íkastið hjá hvørjum studenti og próvdøma avrikini hjá studentunum hvørt sær.

**§ 30**. Próvtøkan er staðin, um próvtalið er í minsta

lagi 6 ella Staðið. Hvør próvtøka skal vera staðin fyri seg. Próvtøka, ið er staðin, kann ikki takast av nýggjum.
*Stk. 2.* Í námsskipanini kann vera ásett, at ein samanseting av próvtøkum verður staðin sum ein próvtøka. Í hesum føri skal miðalpróvtalið vera í minsta lagi 6 uttan upprunding.

**§ 31**. Um studentur vegna sjúku ella av øðrum lógligum forfalli er forðaður í at møta til próvtøku, skal hann hava møguleika at fara upp aftur til próvtøku skjótast til ber ella í seinasta lagi í næsta próvtøkuskeiði.
*Stk. 2.* Um studentur vegna sjúku er forðaður í at møta til próvtøku, og ynksir at fara upp til próvtøku sambært stk.1, skal hann framleggja eina læknaváttan.

**§ 32**. Fróðskaparsetrið eigur at kunna studentarnar um:
1) Próvtøkureglur.
2) Reglur í sambandi við sjúku.
3) Serligar próvtøkureglur í einstøku lærugreinunum.
4) Avleiðingarnar av ikki at fylgja reglum um próvtøku, og
5) Kærumøguleikar.

**§ 33**. Studentur kann í mesta lagi fara tríggjar ferðir til somu próvtøku. Dekanurin kann eftir skrivligari umsókn loyva studentinum at fara til próvtøku í sama faki fjórðu ferð, um serligar umstøður tala fyri tí.

**§ 34**. Fyri hvørja einstaka próvtøku ásetur avvarðandi dekanur tíðarfreist fyri innskriving og avboð. Um avboðið ikki er rættstundis, verður próvtøkan at telja sum ein próvtøka sambært § 33. Hetta er tó ikki galdandi, um studenturin ikki fær møtt til próvtøku vegna sjúku ella annað lógligt forfall sambært § 31.
*Stk. 2.* Tá serligar umstøður gera seg galdandi, kann dekanurin eftir skrivligari umsókn gera frávik frá tíðarfreistunum í stk. 1.

**§ 35**. Próvtøkuspurningin ger vísindastarvsfólkið ella lærarin, sum hevur undirvíst. Próvdómarin skal góðkenna próvtøkuspurningin.
*Stk. 2.* Verður undir ella eftir próvtøkuna gjørt vart við álvarsamt mistak ella vantandi upplýsingar í próvtøkuuppgávuni, skal beinanvegin verða boðað avvarðandi dekani frá. Lærari ella próvdómari gera tilmæli um, hvussu bøtast kann um skeivleikan.
*Stk. 3.* Eftir tilmæli frá próvdómara ella lærara kann dekanur í tílíkum føri strika próvtøkuna og skipa fyri serligari umprøvtøku.

**§ 36**. Studentur kann verða burturvístur frá próvtøku, um hann:
1) Undir próvtøku útvegar sær sjálvum ella øðrum ólógliga hjálp,
2) hevur við sær amboð, ið ikki eru loyvd til ta ávísu próvtøkuna ella
3) gevur arbeiði hjá øðrum út fyri sítt egna.
*Stk. 2.* Verður illgruni staðfestur um, at ein studentur hevur útvegað sær ella øðrum ikki loyvda hjálp, ella um ein studentur hevur givið arbeiði hjá øðrum út fyri sítt egna, skal boðast frá hesum til avvarðandi megindeild. Verður illgrunin váttaður, ger dekanurin av, um próvtøkan skal strikast og próvtalið falla burtur hjá tí, ið hevur svikað. Próvtøkan telur kortini sum ein próvtøka sambært § 33.
*Stk. 3.* Dekanur kann í serliga álvarsligum førum vísa studentinum burtur í eina ella fleiri lestrarhálvur. Í slíkum føri verður skrivlig ávaring givin um, at verður svikað aftur, kann tað hava við sær varandi burturvísing.

**§ 37**. Kann próvtal ikki latast studentinum beint eftir próvtøkuna, ásetur dekanurin freist fyri, nær próvtalið í seinasta lagi skal verða givið. Freistin skal vera kunngjørd framman undan próvtøkuni.

**§ 38**. Munnligar próvtøkur eru almennar.
*Stk. 2.* Við munnligar próvtøkur kann dekanurin avmarka atgongdina til próvtøkuhølini vegna plásstrot ella órógv í sambandi við próvtøkuna. Dekanur kann somuleiðis gera frávik frá stk. 1, um serligar umstøður tala fyri tí.

## Kapittul 6
## Próvtalsgáva

**§ 39.** Til próvtøku, har avrik ikki verður mett staðið ella ikki staðið, verður tað mett eftir hesum próvtalsstiga:

| Støðan: | Stig: |
|---|---|
| | 13 |
| Sera góð | 11 |
| | 10 |
| | 9 |
| Góð | 8 |
| | 7 |
| | 6 |
| | 5 |
| Ikki góð | 03 |
| | 00 |

*Stk. 2.* At meta sum próvtøku sambært hesi kunngerð er próvtøkan ella royndin, ið beinleiðis ella óbeinleiðis er avgerandi fyri, um próvtakarin røkkur endaligum prógvi.

**§ 40.** Til grund fyri metingini verður at leggja atferð próvtakarans í próvtøkulagnum.
*Stk. 2.* Próvtøkulagið skal geva próvtakaranum høvi at vísa hegni, vitan og fatan viðvíkjandi hugtøkum, arbeiðsháttum og sannroyndum um tað evnið, próvtøkan fevnir um.

*Stk. 3.* Próvtøkuatferðin er mátin, ið próvtakarin í próvtøkulagnum setir saman og metir um partar av evninum, grundgevingarnar fyri at draga teir fram, heildarmetingarnar um tað framlagda og atfinningar hansara at tí.
*Stk. 4.* Próvtakarin skal vísa, hvussu hann við vitan síni er førur fyri at loysa greiðsluevni av kendum slagi, og um próvtøkulagið loyvir tí, loysa greiðsluevni av ókendum slagi.

**§ 41.** Tann sera góða próvtøkuatferðin er sermerkt av at:
1) Próvtakarin hevur sera góða vitan um hugtøk, arbeiðshættir og sannroyndir.
2) Próvtakarin greiðir frá, soleiðis at flest viðurskifti verða tikin við.
3) Próvtakarin gevur eina næstan fullfíggjaða grundgeving fyri at draga tey fram.
4) Próvtakarin ber saman ella setir saman arbeiðshættir og sannroyndir á sera greiðan hátt, og somuleiðis er førur fyri at meta um, og út frá tí geva eina heildarmeting.
5) Próvtakarin á tryggan hátt nýtir sína vitan at loysa greiðsluevni av kendum slagi og møguliga vísir, hvussu greiðsluevni av ókendum slagi kunnu sammetast og loysnir fáast á teimum.

**§ 42.** Tann góða próvtøkuatferðin er sermerkt av at:
1) Próvtakarin hevur góða vitan um hugtøk, arbeiðshættir og sannroyndir.
2) Próvtakarin greiðir frá, soleiðis at fleiri viðurskifti verða tikin við.
3) Próvtakarin gevur eina góða grundgeving fyri at draga tey fram.
4) Próvtakarin ber saman ella setir saman arbeiðshættir og sannroyndir á greiðan hátt og somuleiðis er førur fyri at meta um og út frá tí geva eina heildarmeting.
5) Próvtakarin nýtir vitan sína at loysa greiðsluevni av kendum slagi.

**§ 43.** Tann ikki góða próvtøkuatferðin er sermerkt av at:
1) Próvtakarin hevur lítla vitan um hugtøk, arbeiðshættir og sannroyndir.
2) Próvtakarin greiðir frá, soleiðis at nøkur viðurskifti verða tikin við.
3) Próvtakarin gevur eina ógreiða grundgeving fyri at draga tey fram.
4) Próvtakarin ber saman ella setir saman arbeiðshættir og sannroyndir, men ikki er førur fyri at meta um og út frá tí geva eina heildarmeting.
5) Próvtakarin nýtir sína vitan at loysa greiðsluevni av kendum slagi, men soleiðis at framløgan sum heild er merkt av ótryggleika.

**§ 44.** Próvtøkuatferðirnar, ið eru nevndar í §§ 41-43, lýsa próvtalastigan sum eina heild. Lýsingarnar av støðuni svara til stigatalið í miðjari støðuni, ávikavist 11, 8 og 03.
*Stk. 2.* Tá ið próvtal verður givið, verður fyrst mett um, hvar á próvtalastiganum støðan hoyrir til. Tá støðan er fastløgd, verða tað frávikini frá lýsingini av próvtøkuatferðini ið eru avgerandi fyri, um próvtalið verður hægri ella lægri enn talið, ið svarar til lýsingina.

**§ 45.** Í teimum førum, har fleiri próvtøl verða givin í einum evni, og har bert eitt próvtal verður nýtt, verður miðaltalið roknað út. Tá tað verður gjørt, má bert brúkast ein desimalur, og endaliga próvtalið má ikki vera desimaltal. Er avlopið 0,5 ella meira, verður próvtalið hækkað.
*Stk. 2.* Miðaltalið á endaliga próvnum kann tó vera við einum desimali. Útrokningin av hesum tali verður gjørd út frá endaligu tølunum í stk. 1.

## Kapittul 7
## Prógv

**§ 46**. Fróðskaparsetrið skrivar út prógv fyri útbúgving, sum er staðin. Á próvnum skal standa:
1) navn útbúgvingarstovnsins á føroyskum og enskum,
2) navn og føðingardagur hjá tí, sum hevur staðið útbúgvingina,
3) heitið, sum útbúgvingin gevur rætt til á føroyskum og á enskum og
4) heimildin fyri útbúgvingini.
*Stk. 2.* Rektarin og avvarðandi dekanur skriva undir prógvið.
*Stk. 3.* Aftur at próvnum skal fylgja próvtalayvirlit á føroyskum og enskum, ið fevnir um:
1) fakini, sum eru staðin,
2) próvúrslitini,
3) námsstig fyri hvørt fak sær og
4) flutt avrik frá øðrum útbúgvingarstovnum.
*Stk. 4.* Fyrisitingarstjórin skrivar undir próvtalayvirlitið.
*Stk. 5.* Sum fylgiskjal til prógv við letur Fróðskaparsetrið eitt Diploma Supplement á enskum, sum samsvarar við ásetingarnar hjá ES-kommisjónini, Evroparáðnum og UNESCO/CEPES.
*Stk. 6.* Studentur, sum gevst, hevur rætt til váttan fyri tær próvtøkur, ið hann hevur staðið.

## Kapittul 8
## Kærur

**§ 47.** Kærur um avgerðir í sambandi við próvtøku sambært hesi kunngerð skulu latast Fróðskaparsetrinum skrivliga við grundgevingum.
*Stk. 2.* Kærufreistin er 2 vikur frá tí, at studenturin hevur fingið avgerðina at vita. Í undantaksføri kann Fróðskaparsetrið víkja frá tíðarfreistini.

**§ 48**. Kærur um rættarspurningar verða viðgjørdar av dekaninum.

**§ 49**. Kært kann verða um:
1) próvtøkugrundarlagið (próvtøkuspurning, uppgávur ella tílíkt) í mun til pensum,
2) próvtøkugongdina ella
3) próvdømingina.

*Stk. 2*. Dekanurin leggur skjótast til ber kæruna fyri læraran og próvdómaran til viðmerkingar og tilmæli.

*Stk. 3*. Dekanurin tekur avgerð í kærumálum, og niðurstøðan kann vera:
1) At tað verður gjørd umdøming,
2) at bjóða endurpróvtøku ella
3) at kæran verður víst aftur

*Stk. 4*. Við umdøming og við endurpróvtøku kunnu nýggj fólk verða sett at døma avrikið. Tað seinasta próvtalið verður tá at galda og tað fyrra fellir burtur.

*Stk. 5*. Verður niðurstøðan umdøming ella endurpróvtøka, endar málið her.

**§ 50**. Vísir dekanurin kæruni aftur, sbr. § 49, stk. 3, 3. pkt. kann kærast skrivliga til rektaran, sum kann seta eina kærunevnd í hvørjum einstøkum føri. Kærufreistin er 2 vikur frá tí, at dekanurin hevur kunngjørt avgerðina. Kæran skal vera stílað til rektaran.

*Stk. 2*. Kærunevndin verður mannað við tveimum góðkendum uttansetursprófdómarum. Ber tað ikki til, verður kærunevndin mannað av ad hoc tilnevndum uttansetursprófdómarum, einum vísindastarvsfólki á Fróðskaparsetrinum og einum studenti innan fakøkið á Fróðskaparsetrinum. Rektarin tilnevnir formannin.

*Stk. 3*. Formaðurin hevur ábyrgdina av, at allir nevndarlimirnir taka lut í viðgerðini. Avgerð verður tikin við atkvøðugreiðslu. Stendur á jøvnum, er atkvøða formansins avgerandi.

**§ 51.** Kærunevndin kann:
1) hækka próvtalið ella broyta Ikki staðið til Staðið,
2) avgera, at umdøming verður við nýggjum próvdómarum,
3) bjóða endurpróvtøku við nýggjum próvdómarum ella

vísa kæruni aftur.

*Stk. 2*. Ger kærunevndin av at hækka próvtalið ella broyta Ikki staðið til Staðið, skal studentaumboðið ikki vera við í restini av viðgerðini.

*Stk. 3*. Avgerð kærunevndarinnar kann ikki kærast til annan fyrisitingarligan myndugleika.

## Kapittul 9
## Gildiskoma og skiftisásetingar

**§ 52.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og er galdandi fyri lesandi á Fróðskaparsetri Føroya, sum eru farin undir lestur fyri 1. august 2008.

*Stk.* 2. Lesandi sambært stk. 1 skulu hava lokið prógv í seinasta lagi 12. august 2012.

*Stk.* 3. Kunngerðin er eisini galdandi fyri lesandi í Almennum próvskeiði í føroyskum, sbr. kap. 3. sum byrjað hava lesturin aftaná 1. august 2008.

*Stk. 4*. Kap. 6 er eisini galdandi fyri lesandi, sum byrjað hava lesturin eftir 1. august 2008.

Mentamálaráðið, 9. juni 2009

**Helena Dam á Neystabø (sign.)**
landsstýriskvinna

/ Leivur Harryson (sign.)

Nr. 86 11. juni 2009

# Kunngerð
# um
# gjøld fyri útflýggjan av upplýsingum og skjølum frá Skráseting Føroya

Við heimild í § 154, stk. 7 í fyriskipan nr. 1356 frá 9. desember 2007 um ígildissetan fyri Føroyar av lóg um partafeløg og § 69 stk. 6 í fyriskipan nr. 1111 frá 20. september 2007 um ígildissetan fyri Føroyar av lóg um smápartafeløg, hevur landsstýrið fyrisett:

## Kapittul 1
## Almennar reglur

**§ 1.** Upplýsingar um virkir, skrásett hjá Skráseting Føroya, kunnu bíleggjast skrivliga. Ásetta gjaldið skal sendast við hesum skrivi.
*Stk. 2.* Sama er galdandi fyri serstakar váttanir v.m. viðvíkjandi virkjum og persónum.

## Kapittul 2
## Gjøld fyri veitingar

**§ 2.** Fyri váttað avrit av niðanfyri nevndu skjølum er gjaldið:

1) Útskrift fyri hvørt virkið sær.................. 450 kr.
2) Samandráttur.......................................... 300 kr.
3) Tekningarútskrift.................................... 100 kr.
4) Stovningarsamtykt................................... 200 kr.
5) Viðtøkur.................................................. 200 kr.
6) Samanleggingarætlanir .......................... 125 kr.
7) Roknskapir.............................................. 200 kr.
8) Fráboðanir. ............................................. 125 kr.
9) Onnur skjøl, 10. kr. fyri hvørja síðu,
tó í minsta lagi....................................... 125 kr.

*Stk. 2.* Fyri serstakar váttanir v.m. og fyri allar ella ávísar edv-grundaðar upplýsingar fyri fleiri virkir ella persónar verður goldið eftir rokning.
*Stk. 3.* Við bílegging av øllum óváttaðum roknskapum í einum roknskaparári verður goldið 80 kr. fyri hvønn.

## Kapittul 3
## Ígildissetanarreglur

**§ 3.** Hendan kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Samstundis fer úr gildi kunngerð nr. 34 frá 24. mars 1998 um gjøld fyri útflýgging av upplýsingum og skjølum frá Skráseting Føroya.

Vinnumálaráðið 11. juni 2009

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/Maria Róin (sign.)

Nr. 87 11. juni 2009

# Kunngerð
# um
# gjøld Skráseting Føroya fyri parta- og smápartafeløg

Við heimild í §154, stk. 7 í fyriskipan nr. 1356 frá 9. desember 2007 um ígildissetan fyri Føroyar av lóg um partafeløg og § 69, stk. 6 í fyriskipan nr. 1111 frá 20. september 2007 um ígildissetan fyri Føroyar av lóg um smápartafeløg, hevur landsstýrið fyrisett:

## Kapittul 1
## Gjøld fyri fráboðan

**§ 1**. Fyri fráboðan av nýggjum partafeløgum verða goldnar 3.500 kr., fyri smápartafeløg tó 2.500 kr.
*Stk. 2.* Fyri fráboðan av nýggjum parta- og smápartafeløgum verður harafturat goldið eitt eyka-gjald upp á 4‰ av teknaða partapeninginum, har hetta gjald tó ikki má fara upp um 25.000 kr. Fyri fráboðan av nýggjum feløgum, stovnað við samanlegging, verður eykagjaldið tó goldið av tí upphæddini sum partapeningur felagsins er meira enn samlaði partapeninurin í teimum báðum samanløgdu feløgunum. Sama gjald verður latið fyri fráboðan um hækkan av parta-peningi í parta- og smápartafeløgum. Fyri samstundis lækkan og hækkan, verður gjaldið tó bert latið av tí upphædd, ið er útyvir lækkanina. Gjaldið má heldur ikki í hesum førum fara upp um 25.000 kr.

**§ 2**. Fyri fráboðan av eini ella fleiri broytingum viðvíkjandi viðurskiftum, ið longu eru skrásett, verða goldnar 1000 kr. fyri hvørja fráboðan sær, sí tó § 6 stk. 2.
*Stk. 2.* Viðvíkur broytingarfráboðanin uppafturtøku av rakstrinum hjá einum parta- ella smápartafelag, verða goldnar 5.000 kr. fyri hvørja fráboðan sær í teimum førum, har Skráseting Føroya hevur heitt á skiftirættin um at avtaka felagið sambært § 117 í fyriskipan nr. 1356 frá 20. des. 2007 um partafeløg ella § 60 í fyriskipan nr. 1111 frá 20. sept. 2007 um smápartafeløg.

**§ 3**. Fyri fráboðan av deildum og virkisdeildum í útlendskum fyritøkum, sum hava heimstað uttan fyri Føroyar, verða goldnar 2000 kr.

**§ 4**. Gjaldið sambært §§ 1 – 3 skal gjaldast saman við fráboðanini. Fráboðanin verður ikki viðgjørd fyrr enn gjaldið er goldið.

## Kapittul 2
## Ársgjald

**§ 5**. Fyri innsending og kunngerðing av ársroknskapum v.m. verða goldnar 1200 kr. um árið, fyri smápartafeløg tó 700 kr. sbr. § 154 stk 8 í partafelagslógini og § 69 stk 7 í smápartafelagslógini.
*Stk. 2.* Tað í stk. 1 nevnda gjald fevnir eisini um fráboðan um broyting av ársroknskaparári, grannskoðaraviðurskiftum, navni ella heimstaði.
*Stk. 3.* Gjaldið fellur til gjaldingar tá ið serligt uppkrav er móttikið. Feløg, ið eru undir avtøku, tá ið uppkravið verður sent, skulu ikki gjalda.

## Kapittul 3
## Ígildissetanarreglur

**§ 6**. Henda kunngerð fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Samstundis fer úr gildi kunngerð nr. 99 frá 18. november 2008 um gjøld Skráseting Føroya fyri parta- og smápartafeløg.

Vinnumálaráðið, 11. juni 2009

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/Maria Róin (sign.)

Nr. 88 17. juni 2009

# Kunngerð um ískoytisútbúgving fyri sjúkrarøktarfrøðingar, útbúnir eftir eldri lógum

Við heimild í § 18, stk. 5 í løgtingslóg nr. 2 frá 22. januar 2003 um útbúgving av sjúkrarøktarfrøðingum verður ásett:

*Endamál, longd, o.a.*

**§ 1.** Endamálið við ískoytisútbúgvingini til bachelor í sjúkrarøktarfrøði er at geva sjúkrarøktarfrøðingum, ið eru útbúnir eftir eldri lógum, møguleika til at uppstiga eldru útbúgvingina til bachelor í sjúkrarøktarfrøði. Ískoytisútbúgvingin skal geva teimum lesandi ástøðiligan og verkligan førleika og kunnleika til vísindalig háttaløg og evnir til eftir lokna útbúgving at:

1) menna sjúkrarøkt og útinna dygdar- og menningararbeiði og haraftrat fylgja, gera nýtslu av og taka lut í granskingararbeiði á heilsuøkinum og
2) halda fram í ástøðiligum og kliniskum førleikagevandi framhaldslestri, umframt akademiskari framhaldsútbúgving.

**§ 2.** Ískoytisútbúgvingin er ásett at vera ½ studentsársverk ella 30 ECTS stig, men fevnir um eitt ár.
*Stk. 2.* Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya avger, hvussu nógv lesandi kunnu fara undir lestur hvørt skeið. Landsstýrismaðurin kann tó áseta eitt hægsta tal av lesandi við upptøku.

**§ 3.** Ískoytisútbúgvingin gevur rætt til heitið bachelor í sjúkrarøktarfrøði, enska navnið er Bachelor of Science in Nursing (B.Sc.).
*Stk. 2.* Ískoytisútbúgvingin skal vera lokin í seinasta lagi 2 ár eftir, at hon er byrjað. Rektarin kann í serligum førum gera undantøk frá hesi reglu.

*Skipan og innihald*

**§ 4.** Ískoytisútbúgvingin er býtt í tríggjar eindir, sum ávíkavist eru 6, 9 og 15 ECTS stig.
*Stk. 2.* Fyrsta eind er 6 ECTS stig. Luttakararnir ogna sær grundleggjandi kunnleika og háttalagsligan førleika innan vitan, vísindi og gransking á vísindaligum stigi og ogna sær førleika innan eina vísindaliga tilgongd til sjúkrarøktaryrkið. Eisini ogna lesandi sær kunnleika til kunningartøkni.
*Stk. 3.* Onnur eind er 9 ECTS stig, og er valfrí eind. Í valfría partinum kunnu lesandi velja ymisk klinisk sjúkrarøktarfaklig øki, sum skulu verða viðgjørd við støði í fyrstu eind.
*Stk. 4.* Triðja eind er 15 ECTS stig. Ískoytisútbúgvingin endar við bachelorritgerð. Í arbeiðinum við bachelorverkætlanini, sum er 15 ECTS stig, skal tann lesandi vinna sær førleika innan sjúkrarøktarfakligt menningararbeiði. Í verkætlanini verður viðgjørdur ein sjálvvaldur spurningur við evni úr kliniskari sjúkrarøkt og við vísindaligum háttalagi. Verkevnið skal verða góðkent av Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya.

*Próvtøka*

**§ 5.** Rektarin ger av, um royndirnar á ískoytisútbúgvingini eru innanhýsis ella uttanhýsis, og um metingarnar Staðið/Ikki staðið ella próvtalsstigi verður nýttur til royndirnar.
*Stk. 2.* Bachelorverkætlanin verður dømd við einari uttanhýsis roynd.
*Stk. 3.* Tann lesandi skal hava staðið tær innanhýsis og uttanhýsis royndir, sum eru ásettar í námsskipanini fyri fyrstu og aðru eind, áðrenn bachelorverkætlanin er endaliga avgreidd.
*Stk. 4.* Viðvíkjandi próvtøku, royndarhættum, próvdøming, próvskjølum, kærum um próvtøku osfr. verður víst til kunngerð um próvtøku við útbúgving av sjúkrarøktarfrøðingum.

*Námsskipan*

**§ 6.** Rektarin skal gera eina námsskipan, sum neyvt lýsir innihald o.a. í útbúgvingini. Námsskipanin verður góðkend av landsstýrismanninum.
*Stk. 2.* Í námsskipanini verða ásettar reglur um:

1) endamál og innihald í teimum einstøku lærugreinunum í lestrinum, hvussu nógvar tímar tær fevna um, nær undirvíst verður, og hvussu dømt verður. Lærugreinirnar verða ásettar í ECTS stigum,
2) undirvísingar- og arbeiðshættir í útbúgvingini, íroknað kunningartøkni í undirvísingini, sambært § 4,
3) valfría partin, sambært § 4, stk. 3,
4) bachelorverkætlanin, sbrt. § 4, stk. 4,
5) góðskriving, sambært § 7, stk. 1.

*Stk. 3.* Umframt reglur, sum eru ásettar sambært hesi kunngerð, umfatar námsskipanin reglur, sum eru ásettar sambært kunngerð um próvtøku við útbúgvingina til sjúkrarøktarfrøðing.

*Aðrar reglur*

**§ 7.** Rektarin kann í hvørjum einstøkum føri gera av, at útbúgvingarpartar, sum ein lesandi hevur staðið við eina aðra útbúgving, heilt ella lutvíst kunna góðskrivast í ískoytisútbúgvingini. Avgerðin verður tikin við støði í fakligari meting.
*Stk 2.* Avgerðir rektarans sambært stk. 1 kunnnu verða kærdar til landsstýrismannin.
*Stk. 3.* Kæra kann verða latin inn í seinasta lagi 2 vikur eftir, at tann, sum kærir, hevur fingið fráboðan um avgerðina.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin kann síggja burtur frá kærufreistini, tá serlig viðurskifti tala fyri tí.

**§ 8.** Landsstýrismaðurin kann góðkenna frávik frá hesi kunngerð sum liður í royndar- og menningarvirksemi. Ásett verður, hvussu leingi royndar- og menningarvirksemi skal vara, og hvussu frágreiðing í hesum sambandi skal verða tilevnað.

*Gildiskoma*

**§ 9.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og fevnir eisini um lesandi, sum byrjaðu ískoytisútbúgvingina eftir 1. september 2008.

Mentamálaráðið, 17. juni 2009

**Helena Dam á Neystabø (sign.)**
landsstýriskvinna

/ Leivur Harryson (sign.)

Nr. 89 18. juni 2009

**Kunngerð**
**um**
**gjøld Skráseting Føroya fyri vinnurekandi virki**

Við heimild í §16, stk. 5 í fyriskipan nr. 1114 frá frá 20. september 2007 um ígildissetan fyri Føroyar av lóg um ávís vinnurekandi virki, hevur landsstýrið fyrisett:

**Gjøld fyri fráboðan**

**§ 1**. Fyri fráboðan av nýggjum vinnurekandi virkjum verða goldnar 1600 kr.

**§ 2**. Fyri fráboðan av eini ella fleiri broytingum viðvíkjandi viðurskiftum, ið longu eru skrásett, verða goldnar 300 kr. fyri hvørja fráboðan sær.
*Stk. 2*. Viðvíkur broytingarfráboðanin uppafturtøku av rakstrinum hjá einum vinnurekandi virki, verða goldnar 5.000 kr. fyri hvørja fráboðan sær í teimum førum, har Skráseting Føroya hevur heitt á skiftirættin um at avtaka felagið sambært § 21 í fyriskipan nr. 1114 frá frá 20. september 2007 um ígildissetan fyri Føroyar av lóg um ávís vinnurekandi virki.

**§ 3**. Ásetingarnar í § 1 og § 2 eru somuleiðis galdandi fyri deildir í útlendskum virkjum við avmarkaðari ábyrgd.

**§ 4**. Gjaldið sambært §§ 1 – 3 skal gjaldast saman við fráboðanini. Fráboðanin verður ikki viðgjørd, fyrr enn gjaldið er goldið.

**Ígildissetanarreglur**

**§ 7**. Henda kunngerð fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
*Stk. 2*. Samstundis fer úr gildi kunngerð nr. 98 frá 18. november 2008.

Vinnumálaráðið 18. juni 2009

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/Maria Róin (sign.)

FØROYAPRENT